STUDNI
Student Grant Fund

## Vegleiðing til
# Ferðastuðul til lesandi uttanlands 2018/2019

**1. Hvat er endamálið við ferðastuðlinum?**
Endamálið við ferðastuðlinum er at stuðla føroyingum, ið leita sær til onnur lond í útbúgvingarørindum, at koma heim til Føroya eftir lokna útbúgvingartíð. Hetta verður gjørt við at stuðla fíggjarliga, soleiðis at tey lesandi og børn teirra hava møguleika at koma heim til Føroya eina ferð um árið.

**2. Treytir fyri at fáa ferðastuðul.**
Heimilaður til ferðastuðul er umsøkjari, ið lýkur fylgjandi treytir:

1) Umsøkjarin skal hava serligt tilknýti til Føroyar og kravið er:
   - at umsøkjarin hevur búð í Føroyum í minsta lagi tvey av teimum seinastu trimum árunum beint undan lestrarbyrjan, *ella*
   - at umsøkjarin hevur búð í Føroyum í minsta lagi helvtina av lívinum áðrenn lestrarbyrjan.
2) Umsøkjarin skal ganga á eini góðkendari fulltíðarútbúgving uttan fyri Føroyar, ið er 1 lestrarár ella longri.
3) Umsøkjarin skal vera lestrarvirkin.
   Umsøkjari er lestrarvirkin, um hann ikki er meira enn eitt ár afturúr í lesnaðinum í mun til ásettu lestrartíðina. Harafturat skal tann lesandi møta til frálæruna, lata inn kravdar uppgávur og fara til próvtøkurnar eftir teimum reglum, sum eru galdandi á útbúgvingarstovninum.
4) Umsøkjarin skal vera heiltíðarlesandi. Hetta merkir, at umsøkjari, ið gongur á eftirskúla, á miðnámsskúla ella á líknandi útbúgvingum, skal í minsta lagi hava 20 frálærutímar um vikuna ella tað tímatal, ið stuðulsstovnurin í viðkomandi landi krevur fyri at veita stuðul. Fyri aðrar útbúgvingar verður farið eftir reglunum í punkti 2.3 í hesi vegleiðing, tá metast skal um heiltíðarlestur. Í ivamálum tekur Studni avgerð.
5) Umsøkjarin skal lúka treytirnar fyri lestrartíð:
   - Ferðastuðul verður í mesta lagi veittur til framhaldslestur í 6 ár og ongantíð meira enn 1 ár eftir ásettu lestrartíðina.
   - Undantak frá teimum 6 árunum kann tó gerast, um ásetta lestrartíðin er longri enn 5 ár fyri <u>eina</u> útbúgving.
   - Studni kann harumframt gera undantak frá reglunum, um lestrartíðin er longd vegna ráðsarbeiði, sjúku, barnsburð, ættleiðing ella vísindaligt arbeiði. Skjalprógv skal viðleggjast í hesum førunum.
6) Umsøkjari í partvíst løntari útbúgving er ikki stuðulsheimilaður, um meira enn ½ av samlaða útbúgvingartíðarskeiðnum er lønt.

**3. Útbúgvingar, ið enda við ½ lestrarárum.**
Nakrar framhaldsútbúgvingar eru 2½, 3½ ella 4½ lestrarár til longdar. Er útbúgvingin t.d. longri enn 3 ár, men styttri enn 3½ ár, fáast bert tríggir ferðastuðlar, men er útbúgvingin 3½ lestrarár, t.v.s. 7 lestrarhálvur (semester), er møguligt at fáa 4 ferðastuðlar. Tann lesandi skal bert vera varugur við, at so hevur viðkomandi nýtt 4 ferðastuðlar av teirri samlaðu kvotuni uppá 6 ferðastuðlar til framhaldslestur.

**4. Stuðulsupphæddir og útgjaldingar-háttur.**
Tá Studni hevur fingið umsóknina saman við øllum teimum neyðugu skjalprógvunum, verður peningurin goldin á kontu í einum føroyskum ella donskum peningastovni. Um umsóknin ikki verður gingin á møti, verður avvísingarskriv sent.

Hesar upphæddir eru galdandi

| | Danmark | Evropa (- Danmark og Grønland) | Aðrastaðni |
|---|---|---|---|
| Lesandi | kr. 1.500 | kr. 3.100 | kr. 4.100 |
| Børn: 0 - 1 ár | kr. 200 | kr. 400 | kr. 600 |
| Børn: 2 - 11 ár | kr. 900 | kr. 1.800 | kr. 3.000 |
| Børn: 12 - 16 ár | kr. 1.500 | kr. 3.100 | kr. 4.100 |

**5. Børn.**
Lesandi, sum hava uppihaldsskyldu, kunnu søkja um ferðastuðul til børnini. Ferðastuðulin verður bert veittur børnum, ið ikki hava fylt 16 ár áðrenn 30. juni 2019. Lesa báðir uppihaldararnir, kann bert annar søkja. Búgva uppihaldararnir ikki saman, kann bert tann, sum barnið býr hjá, søkja. Avrit av navnabrævi hjá barni/børnum skal verða lagt við umsóknini, tá søkt verður um ferðastuðul til barn/børn.

**6. Nær skal søkjast um ferðastuðul og nær er umsóknarfreistin?**
Søkjast skal um ferðastuðul í hvørjum lestrarári. Ferðastuðul skal søkjast lestrarhálvuna eftir, at lesandi er byrjaður at lesa, og skal søkjast innan lestrarárið er lokið. Hetta merkir t.d., at ein, ið byrjar lesturin um heystið, ikki kann søkja um ferðastuðul fyrr enn várlestrarhálvan byrjar, og skal hava søkt, áðrenn várlestarhálvan endar, t.v.s., at **umsóknarfreistin fyri hesi er 30. juni.**

Fyri tey, sum byrja lesturin um várið, kann ferðastuðulin ikki søkjast fyrr enn um heystið, og er **umsóknarfreistin fyri hesi 31. desember.** Tað stutta av tí langa er, at ein lesandi altíð skal søkja um ferðastuðul í líkatalslestrarhálvum at rokna frá egnari lestrarbyrjan.

**7. Kærumøguleikar.**
Til ber at kæra avgerðir, sum Studni hevur tikið, til Kærunevndina. Seinasta freist at kæra er 6 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað.
Kærur skulu sendast til:

Kærunevndina hjá Studna
c/o Føroya Kærustovnur
Undir Hornabakka
Postsmoga 45
FO-110 Tórshavn